# ítróttur

Nr. 199 • týsdagur • 19. oktober 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo




*Tað sær hálvgum út, sum hevði Eivind hug at smíla, nú nýggju avtalurnar vórðu skrivaðar undir. Kent L. Christensen og Rógvi Róin tykjast hinvegin meira hugsunarsamir, men teir søgdu seg báðar vera væl nøgdar við avtaluna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Kappingarnar skifta navn

**Hondbóltssambandið hevur gjørt sponsoravtalu við Atlantic Airways og Sunset Boulevard, sum við hesum koma at eiga heitini á fremstu hondbóltsdeildunum**


HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*


Hetta varð almannakunngjørt á tíðindafundi, sum Hondbóltssambandið mánadagin helt í hølunum hjá Sunset Boulevard í SMS.

Eivind Jacobsen, formaður í HSF, greiddi frá, at hetta er ein liður í støðuga arbeiðinum hjá Hondbóltssambandinum at betra um inntøkugrundarlagið. Og tó at tað einki varð sagt um, hvussu stóra upphædd føroyskur hondbóltur fær aftur fyri avtaluna, so duldi formaðurin ikki fyri, at tað hansara eygum var ein upphædd, sum var alt-avgerandi fyri, um Føroyar yvir høvur skulu gera sær nakrar tankar um at taka lut í altjóða kappingum við A-landsliðum okkara.

Største sjónliga broytingin, nú nýggja avtalan er undirskrivað, er, at besta mans- og kvinnudeildin framyvir broyta navn. Hjá monnum fer kappingin í bestu deildini framyvir at eita Atlantic Airways-kappingin, og hjá kvinnunum verður nýggja heitið Sunset-kappingin.

Tað merkir so aftur, at verandi 2. deild broytir navn til 1. deild, eins og samsvarandi broyting sjálvsagt verður gjørd í deildunum niðanfyri hetta eisini.

## Glaðir stuðlar

Eitt er, at formaðurin í HSF er fegin um nýggju avtaluna. Tað, sum kanska eisini er mest positivt fyri Hondbóltssambandið er, at báðir høvuðsstuðlarnir eisini tóktist vera sera væl nøgdir.

Atlantic Airways hevur seinnu árini – serliga við fótbóltslandsliðnum – profilera seg heilt nógv gjøgnum ítróttin, og marknaðarstjórin í felagnum, Kent L. Christensen, var ivaleysur, tá spurt varð, hvørt hetta var ein góður háttur at tengja eina positiva profil at felagnum.

– Eitt er, at vit á hendan hátt kunnu styrkja um profilin ella image'ið á felagnum. Men eg haldi eisini, at tað er meira enn bara tað. Vit hava jú lýst í nógvum miðlum í nógv ár, men av hesum eri eg ikki í iva um, at vit hava fingið mest fyri pengarnar gjøgnum fótbóltslandsliðið, sum jú fær eina ógvuliga góða eksponering.

– Nú verður so arbeiðið við hondbóltslandsliðnum byrja av nýggjum at kalla, og eg haldi heilt avgjørt, at hondbólturin í Føroyum er uppgangandi í løtuni. Tí vilja vit gjarna stuðla, og eins og vit við hesum eru við frá fyrsta degi, og tað rokni eg við fer at gagna okkara fyritøku, segði Kent, tá avtalan var undirskrivað.

Og eisini Rógvi Róin, sum umboðaði Sunset á tíðindafundinum, tóktist vera væl nøgdur um nýggja sáttmálan. Undan hesum hevur Sunset eisini verið høvuðsstuðul hjá kvinnulandsliðnum, og partvíst helt Rógvi eisini, at tann avtalan hevur skundað undir hesa, sum nú er gjørd.

– Vit hildu okkum í øllum førum fáa sera nógv afturfyri avtaluna við kvinnulandsliðnum, sum jú hevði eina framúr væl egnaða ferð í Italia.

– Hartil er tað heldur einki at ivast í, at hetta við at stuðla ítróttinum hóskar seg væl til tann kundabólk, sum vit royna at raka. Ikki endiliga fólk, sum íðka ítrótt á elitustøði, men hetta við at hava sunnan lívsstíl og at vera aktivur. Tí meta vit eisini, at vit fáa nakað burtur úr hesi avtaluni.

Sum nevnt, so varð ikki upplýst, hvussu stórar upphæddir sponsoravtalurnar fevndu um, men talan er so um tvey-ára sáttmálar, sum allir partar søgdu seg hava vónir um fóru at verða longdir til ta tíð.

# HB aftur í aðru deild

**Eykaliðini hjá føðingardagsbørnunu m býttu um pláss í aðru- og triðju deild**


FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*


Eftir at HB vann tryggan 4-0 sigur í fyrra upp- og niðurflytingardystinum, var neyvan nakað annað væntandi, enn at havnarliðið skuldi taka sessin í aðru deild frá klaksvíkingum, sum annars hava verið sera drúgvir í deildini.

Leygardagin var so seinni dysturin millum liðini á skránni, og hesin staðfesti so dyggiliga, at HB í løtuni er tað av feløgunum, sum er betri fyri.

HB hevur á sínum liði fleiri ungar leikarar, sum royna at ota seg fram ímóti besta liðnum, umframt at talan so eisini er um nakrar gamlar kempur, og serliga var tað ein av hesum, sum gjørdi um seg.

Gunnar Mohr stóð sjálvur fyri trimum av málunum hjá HB, umframt at hann legði upp til hini bæði í 5-1 sigrinum, sum staðfesti, at HB nú aftur hevur teir næstbestu í næstbestu deildini.

Og so kundi felagið samstundis seta eitt ordiligt punktum fyri kappingarárinum, tí við hesum hevur HB umboðan í øllum vaksnamannadeildum, tá farið verður undir komandi kappingarárið.

Fjórðu deildar liðið hjá felagnum vann nevnliga sína deild fyrr í ár, og sum tað so skemtiliga verður tikið til á heimasíðu felagsins, so verður áhugavert at vita, hvussu tann trupulleikin verður tackladur, nú liðið er noytt at flyta upp!



Neistin-Kyndil 24-33 (12-15):

# Meistararnir reistust

**Eftir eyðmýkingina móti KÍF fyri viku síðani, reistist Kyndil, tá teir hølvaðu grannarnar ígjøgnum**


HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Blagoje Buha tykist vera í iva um, hvørji ráð nú eru at taka til. Tað sama kann helst eisini sigast um Neistan, sum í løtuni tykist vera í djúpum aldudali*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Talan var um ordans bakkaláara, sum Kyndil fekk í fyrsta umfarinum av landskappingini, tá teir máttu lúta fyri KÍF, sum á pappírinum tykist veikari, enn teir vóru í fjør.

Tí skuldi talan verða um uppreisn, tá grannauppgerðin móti Neistanum stóð á skránni, og her talaði alt fyri einum spennandi dysti.

Neistin hevði í sín lut heldur ikki ráð at tapa, eftir at teir eisini máttu lúta fyri StÍF í sínum premierudysti.

## Lítil spenningur

Fyrstu lítllu løtuna sá eisini út til, at talan skuldi gerast um eina hampuliga javna uppgerð, men skjótt byrjaði Kyndil at draga frá. Ein óhugnaligur effektivitetur saman við heldur dølskum verjuspæli hjá Neistanum, bar við sær, at Kyndil skoraði í hvørjum einasta álopi fyrstu 10 minuttirnar, og tá skjúttarnir hjá Neistum ikki megnaðu at fylgja við, kom eitt hampuliga stórt glopp í.

Ikki minst undraði tað í hesum sambandi, hvussu illa væl vaksna verjan hjá Neistanum riggaði. Hóast allir bakspælararnir eru væl omanfyri teir 180 sentimetrarnar, so sluppu kyndils-menn at kalla ótarnaðir at spáka heilt inn, áðrenn skot vórðu latin av. Ella varð spælt skjótt út á kantarnar, har tunga verjan als ikki megnaði at fylgja við flytingunum.

Neistin fekk betra nakað um hetta, og seinastu løtuna undan steðginum varð munurin minkaður niður í trý mál. Nakað sum tó skuldi vísa seg at verða tað nærmasta, sum teir bláu komu grannunum í dystinum.

## Neistin í kreppu

Tí Kyndil legði aftur bragdliga fyri í seinna hálvleiki. Kanska vóru teir í Neistum ovurtendraðir, ella var talan bara um ófantaligt verjuspæl. Men í øllum førum slapp Kyndil fyri tað heilt nógva at spæla í yvirtali seinasta hálva tíman. Málini skolaðu inn úr øllum ættum, og var tað ikki tí Zeljko Jotic eftir steðgin framdi fleiri góðar bjargingar, so hevði avhølvingin helst verðið nógv størri, enn hon bleiv.

Ein munur upp á níggju mál, er tó helst í sjálvum sær nóg mikið, til at Neistin komandi dagarnar noyðist at leita djúpt, til tess at finna nakað av sjálvsáliti aftur, eins og tað í øllum førum prógvar, at liðið hevur nógv at arbeiða við, um málið um eitt pláss í heiðursmerkjarøðini skal náast.

Á pappírinum er einki at ivast í, at Neistin hevur eitt av sterkastu liðunum í kappingini. Við monnum sum Damir Oros, Áka Mørk og Blagoje Buha hevur liðið leikarar, sum á einum góðum degi uttan stórvegis trupulleikar kunnu røkka 10-12 málum, og tað eigur í øllum førum at vera eitt gott grundarlag at byggja á.

Tað er tó ikki uttan orsøk, at tað ofta verður tikið til, at hondbóltsdystir verða vunnir í verjuspælinum. Her skuldi Neistin havt góðar fortreytir við eini verju, sum helst telist millum tær hægstu í landinum, men at støddin í sjálvum sær ikki er nakar garantur, var dysturin sunnudagin gott dømi um. Oftast tóktist verjuspælið beinleiðis klossut. Kyndils-menn sluppu at ganga heilt inn móti strikuni, áðrenn skot vórðu latin av. Og hóast ferðin ikki var so høg, sum hon væntandi verður seinni á kappingarárinum, so bera 10 útvísingar sítt greiða boð um trupulleikarnar, sum Neistin hevði, tá Kyndil royndi at spæla tunt.

## Gott Kyndils-lag

Hjá Kyndli sær støðan hinvegin eitt sindur bjartari út, eftir at miseran móti KÍF mundi senda lagið niður móti nullpunktinum eftir seinasta vikuskifti.

Liðið líkist at kalla sær sjálvum frá meistaraheitinum í fjør, og við Ragnari Stakksund sum styrki frá grannunum er enn ein strongur í kontraspælinum fingin upp á pláss. Hartil tykist liðið í ár eisini at hava fingið nakað meira breidd í. Ikki minst er Rókur A. Nielsen ein sera spennandi leikari. Enn er hann bara fyrsta árs unglingaleikari, men kropsliga styrkin er stór, og megnar Kyndil at røkja talentið rætt, er einki at ivast í, at teir her hava ein leikara, sum í nógv ár framyvir fer at verða ein av berandi kreftunum á liðnum.

Komandi vikuskifti eitur mótstøðuliðið StÍF, og tað verður kanska ein styrkisroynd hjá Kyndli, sum nú skal prógva, at teir aftur í ár ætla sær ein leiklut í oddinum. Neistin skal tá hitta H71, og hóast vit enn bert eru komin heilt stuttan veg í grundspælinum, so eru longu nú ábendingar um, at hetta verður dysturin, har Neistin skal gera av, hvørt ætlanirnar um heiðursmerki skulu gerast egg ella ungi.

## FAKTA UM DYSTIN

**Neistin-Kyndil 24-33 (12-15)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Áki Mørk 9, Damir Oros 5, Dann Thorleifsson 5, Helgi Michelsen 2, Jón Ludvig 1, Ræni Slættanes 1, Blagoje Buha 1
**Kyndil:** Rókur A. Nielsen 6, Høgni Klein 5, Hans Áki Dal-Christiansen 5(1), Jacob Jónsson 4, Josef Abrahamsen 4(2), Ragnar Stakksund 3, Janus Einar Sørensen 3(1), Finnur Hansson 3
**Brotskøst:** Neistin 1, Kyndil 5
**Útvísingar:** Neistin 10, Kyndil 3
**Dómarar:** Kristian Joensen & Karstin Joensen. Prógvaðu eins og leikararnir, at tað fyrstu vikurnar ræður um at spæla seg í form


**Seinasta freist at lata broytingar inn til telefonbókina 2005 er mánadagin 1. nov. 2004**




**Í mars 2005 verður telefonbókin borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum. Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist við óbroytt.**

**Hvítu síður**

Mánadagin 1. november 2004 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2005 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 660 í telefonbókini 2004,og skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 93 01.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 2.000,00 kr. (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**

Mánadagin 1. november 2004 er seinasta freist at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**
(A) Standardlýsing ................................ kr. 700,00
(B) Innramming ..................................... kr. 800,00
(E) Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) . kr. 25,00
(sí dømi á s. 658 í Telefonbókini 2004)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarblað til Gulu síður er á síðu 659 í telefonbókini 2004, og skal sendast til:
Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn, ella faks 32 11 66.
**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

tel 30 30 30 www.tele.fo www.nummar.fo · info@nummar.fo - www.gulu.fo · info@gulu.fo

FØROYATELE